# Garanti

Treytirnar galda fyri H-Dygd vindeygu frá Grant P/F, v-tal 370.827, hereftir nevndur seljari.

**Garantiin fevnir um**
H-dygd vindeygu: **12 ára garanti**

Premislide dragihurðar: **5 ára garanti**

Besløg sum hongsl, beslagsarmar, skrúvur eller ventilar, sum eru monteraðar við framleiðslu: **5 ára garanti**

Málaðar/lakeraðar fyllingar í træi skulu viðgerast í minsta lagi triðja hvørt ár, fyri at garantiið skal fevna um yvirflaturnar. Um vindeygu og hurðar eru í harðbalnum veðurøki, skulu tær viðgerast oftari enn triðja hvørt ár. Um skaðar koma á yvirflatuna, skulu tær viðgerast beinanvegin.

**Termorútar**
Generelt (sí tó niðanfyri): **10 ára garanti**
Sjónligir feilir millum gløsini: **1 árs garanti**
Leyst leverða tilhoyr t.d. hurðalukkarar, greb og cylindari: **2 ára garanti**

Leveringsábyrgd av eykalutum (tvs. goymsluvørur sum hongsl og besløg)

Hendan ábyrgd er givin av seljara. Hon hvørki avmarkar ella broytir rættindini, sum kundin hevur í avtalunum. Ei heldur ávirkar hon lógartrygdina, sum kundin hevur mótvegis veitara, arbeiðstakara ella seljara.

**Vindeygu og hurðar**

---

2. Um tú gert vart við feilir í framleiðslu og/ella tilfari innan fyri garantitíðarskeiðið, gevur garantiið tær tey rættindi, sum finnast í hesum ábyrgdarskjali. Um neyðugt, verður tað álagt tær at skjalprógva garantitíðarskeiðið. Um latingartíðin ikki kann skjalprógvast, kann seljari tilskila sær rættin at nýta framleiðslutíðina at áseta garantiartíðarskeiðið. Framleiðslutíðarskeiðið er ásett í framleiðsluskipanini hjá seljara.

3. Um so er, at tú innan fyri galdandi ábyrgdartíðarskeið leggur fram prógv um feilir, áleggur tað seljara at bøta um feilirnar ella at veita nýggja vøru uttan rokning, um tað er neyðugt.
Tó rindar seljari sambært hesum ábyrgdarskjali ikki útreiðslur av niðurtøku av gamlari vøru og uppsetan av nýggjari vøru. Seljari rindar ikki fyri útreiðslur, ið standast av fylgiarbeiðum í sambandi við útskiftar vørur, sum eru umfataðar av hesum ábyrgdarskjali. Um vøran ikki longur verður framleidd, tá skjalfesting av feilum verður førd fram, kann seljari veita eina aðra tilsvarandi vøru.

4. Um so er, at framleiðslu- ella tilfarsfeilir kunnu bøtast á fullgóðan hátt við umvæling ella lutvísari útskifting, kann seljari velja hesa loysnina. Umvæling ella lutvís útskifting verður tá framd uttan rokning.

5. Fyri umvældar vørur er upprunaliga ábyrgdartíðarskeiðið galdandi, eisini tá staklutir verða skiftir út. Fyri staklutin, sum verður skiftir út, er altíð eitt 2 ára ábyrgdartíðarskeið, sum er galdandi frá útskiftingardegnum. Um øll vøran verður skift út, tað vil siga alt vindeygað ella hurð við karmi, verður nýtt ábyrgdartíðarskeið galdandi fyri umafturlatnu vøruna.

6. Við atliti til træstaklutir á vindeygum og hurðum, sum undir framleiðsluni hava fingið yvirflataviðgerð, skal keyparin fylgja vegleiðing um viðlíkhald frá seljara. Vegleiðingin skal fylgjast, um keyparin vil varðveita garantirættindini sambært hesum ábyrgdarskjali. Um keyparin hevur ivamál, kann hann seta seg í samband við Grant ella lesa meira á Grant.fo.

7. Ábyrgdin fyri málað hongsl, vindkrókar, krampar og annað fevnir bert um virkisføri og styrki. Garanti verður ikki veitt fyri bindindi av máling, sum flusnar orsakað av brúkstíttleika.

**Termorútar**

8. Innan fyri ábyrgdartíðarskeiðið, sum verður roknað frá innstemplaða framleiðslutíðspunktinum, veitir seljari vissu fyri, at støv og døgg ikki leggja seg innanvert í termorútinum.

9. Ábyrgdin er treytað av:

- At rúturin er ísettur av tænastuástøðingi ella við framleiðslu hjá seljara.
- At rúturin í avstandskinnaranum hevur eitt framleiðslutíðspunkt (mánaður & ár).
- At rúturin er reinsaður á rættan hátt og vardur undir bygging.
- At rúturin ikki hevur fingið skaða av uttanhýsis ágangi so sum av stoytum, sløgum, skøvum undir framleiðslu ella øðrum líknandi.
- At rúturin ikki hevur verið fyri eftirarbeiði ella tillagingum eftir veiting. Tað fevnir um slíping, sandblásing, etsing, máling, klistring og aðra yvirflataviðgerð.
- At neyðugt og áhaldandi viðlíkhald av rammu og karmi er framt av keypara.

10. Ábyrgdin er ikki galdandi fyri skaðar orsakaðir av frostspreinging, ovurhita ella kemiskum álopum á glasi.

11. Seljari hevur ikki ábyrgd av rúti, sum hevur rivur eftir ísetan, uttan so at tað kann prógvast, at brotið er komið við avhendaða termorútinum, og at klagan er gjørd innan 1 ár frá veitingardegi.
Sjónlig meting av breki ella feili

12. Sjónlig brek verða mett bæði frá útsíðu og innsíðu í ógreiðum dagsljósi við 2 metra frástøðu. Afturkasting í glasi verður tó mett við 5 metra frástøðu. Brek ella feilir, sum ikki síggjast frá hesari frástøðu, verða mett sum fríðkandi og harvið ikki grundarlag fyri garantiskaða, uttan so at brekið ella feilurin hevur ávirkan á virkisførið hjá vøruni.

**Almennar reglur**
13. Um so er, at kundin ynskir at boða frá framleiðslu- og/ella tilfarsfeil, skal tað fráboðast seinast 3 mánaðar eftir, at brek ella feilur ella átti at verið uppdagaður. Fráboðan skal gevast seljara ella arbeiðstakara/veitara, sum hevur veitt vøruna.

14. Keypari er undir hesari ábygd ikki tryggjaður fyri brek ella feilir, sum eru orsakaðir av viðurskiftum, ið liggja uttan fyri vanliga nýtslu. Brek og feilir, sum til dømis kunnu afturvísast til skeiva varðveitslu, flutning ella ísetan av veitara ella arbeiðstakara, er ikki galdandi mótvegis seljara sambært hesum ábyrgdarskjali.

15. Hetta garanti er ikki galdandi, um so er, at brek ella feilir standast av skeivari ísetan, ónøktandi viðlíkhaldi ella skeivari viðferð. Víst verður til galdandi vegleiðingar frá seljara um ísetan og viðlíkahald.

16. Døgg uttan fyri rútamillumrúmið er natúrligur og vanligur. Tað er ikki orsakað av breki ella feili við vøruni. Garantiið fevnir tískil ikki um skaðar, sum koma orsakað av døggi í natúrligum umstøðum, har vøran er ísett. Garantiið er tí ikki galdandi fyri vantandi bjálving, manglandi útlufting og onnur slík viðurskifti.

17. Vegleiðingar um ísetan, nýtslu og viðlíkahald kunnu fáast frá seljara ella takast niður á Grant.fo.
18. Hendan ábyrgd er bert galdandi fyri vørur, sum eru í Føroyum, tá ábygdin verður gjørd galdandi.

19. Seljari átekur sær í eitt 25 ára tíðarskeið frá ábyrgdarbyrjan at veita somu ella tilsvarandi eykalutir til seljarans vørur, sum eru umfataðar av hesari ábyrgd. Hetta er tó ikki galdandi fyri vørur seldar undir H-PlusWindows vørumerkinum.